# MEST skal brúka sum

**Samstundis sum ætlanin komandi árini er at veksa um virksemið í øllum skipasmiðjusamtakinum MEST, skal fyritøkan næstu tvey árini spara 10 prosent av orku. Eisini skal mongdin av ruski minka við 15 prosentum. Eitt av amboðunum í hesum umhvørvisátaki, er norðurlendska skrásetingarskipanin EMS-Light, sum MEST er partur av. Við drúgvu royndunum frá risastóru altjóða fyritøkuni Danisco, ivast stjórin hjá MEST, Eyðfinn Egholm, ikki í at ætlanin fer at eydnast. – Hetta er fyri so vítt bara byrjanin, sigur hann**




ORKUSPARING
*Leif Láadal*

Tað er framvegis ein søguligur dámur yvir reyðu høvuðskrivstovuni hjá MEST - ella Tórshavnar Skipasmiðju, sum felagið áður æt. Á veggjunum hanga myndir av flaggprýddum nýbygdum skipum, og hyggur tú út vindeygað í ein eystan, sæst at flaggstongin ikki er fest niður í klettin, men at hon stendur niður í miðjuna á eini stórari skipsskrúvu. Húsini, sum upprunaliga vóru navigatiónsskúli, hava seinnu mongu árini hýst umsitingini hjá einari av størstu og kendastu fyritøkunum í landinum. Tó at fyritøkan í dag hevur deildir kring landið, er tað framvegis í reyðu húsunum í J. C. Svabosgøtu, at avgerðirnar verða tiknar. Og serliga hetta seinasta árið eru stórar og kollveltandi avgerðir tiknar. Avgerðir, ið sum frá líður fara at broyta fyritøkuna munandi, tá tað snýr seg um árin á umhvørvið, og ans fyri tí burðardygga. Skipasmiðjan MEST vil ikki bara vera "best", hon vil eisini vera "minst", tá tað snýr seg um orkubrúk, og harafturat sum minst, tá tað snýr seg um útlát, tó at leiðslan eisini skal virða ynskinum hjá eigarunum um eitt sunt avkast.

### Royndir frá Danisco

Fyri einum lítlum ári síðani tók Eyðfinn Egholm við sum stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju. Eitt tað sjónligasta, sum er hent, síðani nýggi stjórin fór í gongd, er at felagið hevur fingið nýggja navnið MEST, men nógv annað er eisini hent, og nógv fer at henda næstu tíðina. Tað løgna er tó, at nógv av tí, sum fer at henda, er av tí slagnum, sum ikki skal síggjast. Kjølurin er nevniliga lagdur til eina stórfingna ætlan, ið sum frá líður skal minka heilt munandi um orkunýtsluna hjá MEST. Longu í 2010 skal orkunýtslan hjá samtakinum verða 10 prosent minni enn hon var í 2007/08. Eisini skal mongdin av ruski, sum verður framleitt í samtakinum, minka við 15 prosentum hetta tíðarskeið.

At hendan ætlan fer at eydnast, ivast Eyðfinn Egholm ikki í, og hann veit eisini, hvat tað er hann tosar um. Áðrenn hann tók við sum stjóri hjá MEST, arbeiddi hann í nógv ár hjá stóru fyritøkuni Danisco, har hann seinnu árini m.a. hevði ábyrgdina av eini stórari verkætlan, sum skuldi minka um orkunýtsluna. Hetta arbeiðið hevur higartil eydnast somikið væl, at Danisco seinastu 15 árini hevur minkað orkunýtslu sína við 40 prosentum, samstundis sum fyritøkan er vaksin stútt.

### Bara byrjanin

Tað eru ymsir mátar at fáa gongd á orkuminkingina í einari fyritøku, og MEST hevur valt at brúka norðurlendsku skipanina EMS-Light - ein virkisætlan fyri smærri fyritøkur í Álandi, Íslandi og Føroyum - sum lopfjøl.

- Vit kundu gott verið farin í gongd sjálvi, men tá eg hoyrdi um EMS-Light, var upplagt at MEST gjørdist partur av hesi verkætlan, sigur Eyðfinn Egholm, men leggur afturat, at EMS-Light bert er byrjanin.

- Vit hava í sambandi við hesa verkætlan sett okkum sum mál, at minka 10 prosent í orkunýtslu næstu tvey árini, men tað merkir als ikki, at vit so fara at seta okkum upp afturá. Tað snýr seg um at verja umhvørvið sum mest, og samstundis at gerast meiri óheft at einari og somu orkukeldu, nevniliga oljuni, sigur MEST-stjórin.

Júst hvussu stór orkuminkingin hjá MEST verður í framtíðini, ber ikki til seta tal á, tí ætlanin er at orkuminking ella orkusparing skal vera ein reglubundin partur av øllum mannagongdum í fyritøkuni.

- Frá mínari tíð í Danisco veit eg, at slíkar broytingar byrja við einari hugburðsbroyting hjá starvsfólkunum, og tá so hendan hugburðsbroyting er hend og sett í verk, skal nýggi arbeiðshátturin verða ein fastur partur av okkara fyritøku, soleiðis at minking í orkubrúki og arbeiði framímóti alternativum umhvørvisvinarligum loysnum, verður ein natúrligur partur av okkara arbeiði, sigur Eyðfinn Egholm.

Hjá Danisco vístu royndirnar, at bara hugburðsbroytingin hjá starvsfólkunum sum frá leið minkaði orkubrúkið í fyritøkuni 10 prosent.

> *Vilja vit í Føroyum vera partur av altjóða samfelagnum, og tora at hyggja upp á okkara grannar og fólk longri úti í heimi, mugu vit vísa ábyrgd – eisini á umhvørvisøkinum*
>
> Eyðfinn Egholm, stjóri hjá MEST

### Gott lýsingavirði

Alt hetta við umhvørvi og burðardyggari menning hevur verið rættiliga nógv frammi í seinastuni. Onkur skeptikari hevur sagt, at evnið er skapt av politikarum og fjølmiðlafólki, sum

## FAKTA UM MEST

MEST samtakið er ein samanrenning av MEST Tórshavn, MEST Skála, MEST Vestmanna og MEST Runavík. Høvuðsarbeiðsøkið umfatar at smíða, umbyggja og umvæla skip í Havn, á Skála og í Vestmanna. Á deildini í Runavík verður arbeitt við at framleiða vørur úr rustfríum stáli og tænastum í hesum sambandi. MEST ger eisini ymisk arbeiði á landi. Yvir 300 starvsfólk eru knýtt at virkseminum hjá MEST her á landi, og eini 50 hjá dóttirfelagnum, PAM Offshore Service, í Noregi. Øll hesi fólk eru serkøn innan stál, el, mekanikk, hydraulik, timbur og máling. Eisini selur fyritøkan eykalutir, umboðar ymiska útgerð og veitir tænastur við togarum og kranum.

*(Kelda: www.mest.fo)*